# ítróttur

Nr. 146 • fríggjadagur • 5. august 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

## Atli er á veg Sogndal

**KÍ missir eftir øllum at døma liðformannin, sum í næstu viku fer til Sogndal, um KÍ og norska felagið semjast um leiguavtalu fyri tað, sum er eftir av hesum árinum**

NÝGGJUR ÚTISETI
*Jóannes Hansen*

Tað er nógv, sum bendir á, at KÍ liðformaðurin, Atli Danielsen, sunnudagin, tá ið KÍ fer at spæla í Runavík, fer at umboða KÍ fyri seinastu ferð - í hvussu so er í hesum um-farinum. Gamli kenningurin í norskum fótbólti, Sogndal, sum nú er í næstbestu deildini, vil hava Atla at spæla við teimum nú beinanvegin.

- Eg eri áhugaður í at royna meg í Noregi. Eg eri sáttmálabundin at KÍ, og eg havi sagt teimum, at um teir semjast við Sogndal, so vil eg fegin fara til Noregs at spæla, sigur Atli Danielsen.

Í fjør royndarvandi Atli í Sogndal, men tá gjørdi hann av ikki at taka av sáttmálatilboði.

Allan Joensen, sum er ábyrgdarpersónur fyri fótbóltin í KÍ, váttar, at felagið tosar við Sogndal, og at tað er nógv, sum bendir á, at Atli Danielsen sunnudagin fer at spæla fyri síðstu ferð við KÍ í hesum kappingarárinum.

- Teir eru sinnaðir at leiga Atla, og tað vænti eg, at vit fara at semjast um. Sjálvandi kemur tað illa við hjá okkum at missa Atla, men vit góðtaka, at hann ynskir at royna góðu fótbólts-evnini í útlandinum, sigur Allan Joensen.

Atli Danielsen sigur seg ikki kvíga fyri, at tað fer at koma KÍ so mikið illa við, at hann nú fer til Noregs, at teir fara enda í næstbestu deildini:

- Lagið undir venjingunum er gott og hugburðurin góður, og eg haldi, at avrikini undan summarsteðginum móti B36 og HB vístu, at tað gongur rætta vegin, heldur Atli Danielsen.

Sogndal flutti í fjør niður úr Tippuliguni. Teir eru í niðara endanum, og teimum restar miðvallarspælarar.

- Eg vænti, at eg fari at fáa nógva spælitíð. Tá ið eg vandi við teimum í fjør, kendi eg tað soleiðis, at eg ikki beinanvegin fór at verða førur fyri at vinna mær fast pláss. Støðið í næstbestu norsku deildini er kanska ikki nakað hægri, enn tað er her hjá okkum. Men Sogndal selur nógvar spælarar víðari, og eg síggi hetta sum góðan sýnisglugga at sleppa víðari, um tað er tað, sum eg fari at vilja, tá ið hetta skeiðið er liðugt. Nú fái eg kanska høvi at royna lívið sum yrkisspælari í tríggjar mánaðir, og so fáa vit at síggja, um eg geri av at koma aftur til Føroya, ella hvørjir møguleikar kanska fara at vísa seg seinni í heyst, sigur Atli Danielsen.



*Atli Danielsen, liðformaður í KÍ, fer komandi tríggjar mánaðirnar at spæla við norska felagnum Sogndal*

## Talið á útisetum økist

**Umframt sjálvskrivaða Toda Jónsson hevur venjarin aftur sent boð eftir Kára Nielsen, nú tveir av veteranunum eru burturi**

LANDSLIÐIÐ
*Jóannes Hansen*

Fyrrapartin í gjár boðaði Henrik Larsen, landsliðsvenjari, sum var á veg aftur til Keypmannahavnar, eftir at hann hevði verið í Kristiansand og sæð Toda Jónsson spælt, frá, hvørjar spælarar hann vil hava at umboða Føroyar, tá ið Kypros mikudagin 17. august kemur henda vegin at spæla HM undankappingardyst.

Mikukvøldið hevur sannført venjaran um, at Todi Jónsson skal vera við. Umframt hann eru sammett við dystin móti Írlandi í juni Kári Nielsen og Bárður Johannesen úr HB nýggir á liðnum. Todi Jónsson og Kári Nielsen loysa Fróða Benjaminsen og Julian Johnsson av. Julian er langtíðarskaddur, og Fróði er leikbannaður.

Símun Samuelsen úr VB, sum júst er fluttur til Keflavíkar, hevur verið ógvuliga eyðsýndur fleiri tær seinastu ferðirnar, men venjarin hevur ikki mett, at hann skuldi fáa møguleikan hesa ferð.

Jákup Mikkelsen er eisini leikbannaður. Tí hevur Bárður Johannesen fingið boð. Móti Írlandi vandi Gunnar Nielsen saman við Jákupi Mikkelsen og Jens Martini Knudsen, og hesa ferð verða tað Bárður Johannesen og Gunnar Nielsen, sum fara at stríðast um næsta málverjuplássið. Eingin ivi er um, at Jens Martin Knudsen fer at verja málið annað mikukvøld á Svangaskarði.

### Útisetarnir

Merkisvert er tað, at talið á útisetum, sum eru á landsliðnum, aftur er farið at fjølgast, eftir at tað eitt skifti hevur verið minkandi. Hesa ferð eru átta av nítjan spælarum úr útlendskum feløgum.

Rógvi Jacobsen kemur úr Íslandi, Todi Jónsson úr Noregi, Claus Bech Jørgensen úr Onglandi og úr Danmark koma Súni Olsen, Johan B.Hansen, Gunnar Nielsen, Andrew av Fløtum og Jón Rói Jacobsen, sum hevur verið so mikið plágaður av skaða í aðrari stórutáini, at hann ikki var førur fyri at spæla, tá ið fyrsta umfarið sunnudagin var í næstbestu donsku deildini.

Landsliðsspælararnir skulu hittast mánadagin 15. august. Umfarið í Formuladeildini annað vikuskiftið verður sambært skipanini spælt leygardagin, so spælararnir fáa eyka hvíludag, áðrenn teir fara undir fyrireikingarnar til mest spennandi avbjóðingina í hesi HM undankappingini.

Teir nítjan, sum hava fingið landsliðsboð, eru Jens Martin Knudsen og Christian H. Jacobsen, NSÍ, Ingi Højsted, B36, Óli Johannesen, TB, Mortan úr Hørg, VB, Atli Danielsen og Heðin á Lakjuni, KÍ, Jákup á Borg, Kári Nielsen og Bárður Johannesen, HB, Andrew av Fløtum, Fremad Amager, Johan B. Hansen, Horsens BK, Gunnar Nielsen og Jón Rói Jacobsen, FREM, Rógvi Jacobsen KR, Claus B. Jørgensen, Coventry, Súni Olsen AaB og Todi Jónsson, Start Kristiansand.



*Súni Olsen er nýggjasti útisetin á landsliðnum*